# Sum ein dreymur

**– Hetta var sum at koyra ein kombineraðan Rolls Royce og Ferrari, sigur orkesturleiðarin hjá Føroya Symfoniorkestri**

TÓNLEIKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Orkesturleiðarin hjá Føroya Symfoniorkestri, Bernharður Wilkinson, frammanfyri eini plakat, har lýst verður við stórfingnu konsertini. Eina staðni á plakatini stendur Wilkinson*

– Hin 11. juni var ein stórur dagur í mínum lívi

Orðini eigur tónleikarin Bernharður Wilkinson.

Hetta seinasta hálva árið hevur hann stjórnað Føroya Symfoniorkestri.

Men tá ið hann kallar 11. juni fyri ein stóran dag í lívinum, hevði tað fyri so vítt onki við føroyskan tónleik at gera.

Men hendan dagin upplivdi Bernharður Wilkonson tað, sum bara er unt teimum fægstu tónleikarum: At stjórna einum av heimsins kendastu orkestrum.

Hendan dagin stjórnaði hann nevniliga symfoniorkestrinum í St. Pætursborg í Russlandi, sum avgjørt hoyrir til teir allar tyngstu tungvektararnar í alheims tónleikalívinum.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Bernharður Wilkinson er í St. Pætursborg í tónleikaørindum.

Fyri tveimum árum síðani var hann har og stjórnaði einum øðrum orkestri, tá ið tað spældi Requiem hjá Mozart.

Annars var upprunaliga ætlanin, at Vladimir Ashkenazy skuldi stjórna symfoniorkestrinum í St Pætursborg á konsertini 11. juni, sum var partur í árligu konsertskránni hjá orkestrinum.

Men tá ið hann gav avboð, varð heitt á Bernharð Wilkinson um at taka yvir. Hetta má sigast at vera eitt herðaklapp til orkesturleiðaran hjá Føroya Symfoniorkestri.

Sjálvur tók Bernharður Wilkinson hetta sum ein møguleika, hann avgjørt ikki kundi siga frá sær.

Og tónleikastykkið, sum var á skránni,var heldur ikki hissini.

Tónleikaverikið, sum Bernharður Wilkinson skuldi leiða symfoniorkestrið í St. Pætursborg ígjøgnum, var stórverkið, Ødipus, eftir russiska tónasmiðin, Igor Stravinsky

Og konsertsalurin var einki minni enn kendi Schostakovich-salurin, har symfoniorkestrið vanliga heldur til.

Tvey manskór, eitt úr Finnlandi og eitt úr Íslandi, sungu verkið saman við orkestrinum og hartil vóru fimm sangsolistar úr Íslandi, Litauen, Polandi og Týsklandi og ein frásøgumaður úr St. Pætursburg, við í framførsluni.

Ødipus Rex er annars ikki so ofta at hoyram hvørki í Russlandi, ella aðrastaðni í heiminum, tí tað er so krevjandi at framføra. Eitt nú er bæði brúk fyri stórum mannskóri, fimm solistum og einum frásøgumanni. Og seinast, symfoniorkestrið í St. Pætursborg framførdi verkið, varð mitt í sjeytiárunum.

Bernharður Wilkinson hevur havt eina drúgva og fjølbroytta tónleikatilveru, men hetta má avgjørt sigast at vera eitt hæddarpunkt.

Hóast navnið ljóðar útlendskt, er hann als ikki ókendur við føroysk viðurskifti. Hann er føddur og uppvaksin í Bretlandi, men hann er hálvur føroyingur og hevur verið her nógvar ferðir, bæði í tónleikaørindum og privat.

Hesi seinastu nógvu árini hevur hann búð í Íslandi, men nú er hann fluttur til Føroya, her hann m.a. stjórnar Føroya Symfoniorkestri

## Sum ein dreymur

– Hetta var sum ein dreymur, sum gjørdust veruleiki, sigur Bernharður Wilkinson, tá ið vit spyrja hann, hvussu tað var at standa frammanfyri hesum frálíka og søguríka orkestri.

Orksetrið hevur spælt mong stórverk og í Schostakovich-høllini hevur hetta framúrskarandi orkestrið frumframført tey flestu av teim russisku stórverkunum eftir Tchaikovsky, Prokofiev, Stravinsky, Schostakovich og øðrum.

– Orkestrið hevur eina ríka søgu og nógvar ótrúligar framførslur á baki, og her hava teir flestu altjóða tónleikararnir og orkesturleiðararnir spælt og stjórnað.

– So ikki kann sigast annað, at eg var ikki stórt eyðmjúkur, tá ið eg stóð frammanfyri hesum mæta orkestri, sigur Bernharður Wilkinson.

Hann sigur, at hetta upplivilsi gjørdist enn størri við tað, at salurin var fullsettur á sjálvari konsertini og at áhoyrararnir fagnaðu framførsluni óført

– At stjórna symfoniorkestrinum í St. Pætursborg kann samanberast við at koyra ein kombineraðan Rolls Royce og Ferrari. Tað er tann fullkomna kombinatiónin, sigur Bernharður Wilkinson.

Heimafturkomin úr Russlandi, fór hann beint til Íslands, har hann skuldi stjórna íslendska symfoniorkestrinum í sambandi við upptøku til eina fløgu. Hesar upptøkur eru júst er liðug.

Úr Íslandi gekk leiðis beinleiðis til Fraklands, har hann hevur spælt á konsert við Blásarakvintett Reykjavíkar, sum er ein bólkur, hann hevur spælt við í nógv ár.



*– Eg var ikki sørst eyðmjúkur at standa frammanfyri hesum mæta og søguríka orkestri. At stjørna hesum framúrskarandi tónleikarunum var sum at koyra eina kombinatión av einum Rolls Royce og einum Ferrari, sigur Bernharður Wilkinson*



*Hetta er stórfingna Schostakovich-høllin í St. Pætursborg, har symfoniorkestrið heldur til og har konsertin var*



# Insulintilburðir gerast færri

**Ein spildurnýggj insulinpumpa kann nú geva sukursjúklingum eitt fleksiblari, fríari og sunnari lív. – Við tað at nýggja pumpan gevur eitt neyvari og beinraknari blóðsukurtal enn sproyturnar, eru sannlíkindini fyri vandamiklum insulintilburðum minni nú, og hetta er ein kollvelting á økinum, sigur Jens Andreasen, lækni. Hann vónar, at pumpan næstu árini gerst ein standard tænasta í Føroyum**

SUKURSJÚKA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*




*– Við tað at nýggja pumpan gevur eitt neyvari og beinraknari blóðsukur enn sproyturnar, eru sannlíkindini fyri skaðiligum insulintilburðum minni nú, sigur Jens Andreasen, lækni*

Í staðin fyri at nýta sproytu fleiri ferðir um dagin fyri at fáa neyðuga insulinið er spildurnýggj insulinpumpa nú komin til Føroya, og týsmorgunin varð farið undir at royndarkoyra insulinpumpuna við trimum føroyskum sukursjúklingum (diabetikarum).

Jens Andreasen, lækni, hevur síðani 1997 varað av sukursjúkuøkinum á Landssjúkrahúsinum, og sambært honum er talan um eina kollvelting. Praktisku og fysiologisku fyrimunirnir eru fleiri við nýggju, lítlu pumpuni, sum er á stødd við hálvaaðru svávuldós og kann setast ymsastaðni á kroppin.

## Neyvt blóðsukur

Í fyrstu atløgu hevur Jens Andreasen fingið tríggjar pumpur til Føroya at royndarkoyra í nakrar mánaðir, sum hvør kostar 10.000 krónur og er framleidd í Sveits.

– Høvuðsfyrimunurin við hesi pumpuni er, at hon kann programmerast sera neyvt og beinrakið, so vandamiklu insulintilburðirnir gerast færri, sigur Jens Andreasen. Í staðin fyri stórar mongdir av insulinið við sproytu fleiri ferðir um dagin fær kroppurin eina lítla nøgd av insulinið triðja hvønn minutt við nýggju pumpuni, og Jens Andreasen sigur, at reguleringin av blóðsukrinum gerst nú nógv neyvari hjá sukursjúklingum.

– Sostatt verða árinini av sukursjúku munandi meiri avmarkað, og hetta veitir sjúklinginum størri trygd, um hann røkir uppgávu sína og minnist til krøvini, sigur Jens Andreasen.

## Engagement

Nýggja pumpan kann sambært Jens programmerast á tann hátt, at hon hermir eftir náttúrligu, likamligu insulinframleiðsluni, men fyri at náa optimal úrslit krevst engagement frá sjúklingunum.

– Hóast sukursjúklingar við nýggju pumpuni bert skulu skifta nál tvær ferðir um vikuna, merkir tað ikki, at einki nú er at minnast til, sigur Jens. Pumpan skal nevniliga aktiverast umleið tríggjar ferðir um dagin til stóru máltíðirnar, tá kroppurin skal hava størri mongdir av insulini.

– Við nýggju pumpuni er sjúklingurin vorðin sín egni maskinmeistari og skal vita, nær hann skal justera pumpuna, sigur Jens Andreasen.

## Færri insulintilburðir

Fyri sukursjúklingar er bæði insulinsjokk (ov nógv insulin) og sýrueitran (ov lítið insulin) ein høvuðsvandi, sum allatíðina spøkir, um sjúklingar ikki røkja sína uppgávu. Hetta kann gerast so álvarsamt, at sjúklingar kunnu doyggja av hesum sama, og gjøgnum tíðirnar eru einstøk dømi í Føroyum um deyðsføll, serliga av sýrueitran. Jens Andreasen sigur, at nýggja pumpan minkar um henda vandan.

– Við tað at nýggja pumpan gevur eitt neyvari og beinraknari blóðsukur enn sproyturnar, eru sannlíkindini fyri skaðiligum insulintilburðum minni nú, sigur Jens Andreasen, sum fegnast um framstigið og vónar, at pumpan næstu árini vinnur frama í Føroyum.

## Standard tænasta

Talan er í veruleikanum ikki um eina spildurnýggja vøru, tí pumpan hevur eksisterað í eini 15 ár. Tá kostaði hon so nógv, at eingin sjúklingur kundi keypa hana. Fyri fimm árum síðani kostaði hon 35.000 krónur, og í dag kunnu sjúklingar ogna sær hana fyri 10.000 krónur, hóast hon er vorðin betri á allan hátt. Meðan tær tríggjar pumpurnar í Føroyum eru úr Sveits, eru slíkar at fáa í seks øðrum londum í heiminum, m.a. USA og Suðurkorea.

– Danmark hevur higartil havt ein konservativan hugburð til nýggju pumpuna, og tí eru enn bert 150 pumpur niðri, men í Noregi nýta 3000 sukursjúklingar insulinpumpu, og talið er enn hægri í Svøríki, sigur Jens Andreasen, sum vónar, at føroyingar eisini kunnu fáa gleði av kollveltandi pumpuni.

– Higartil hava fleiri foreldur spurt seg fyri, og nú verður hon royndarkoyrd við trimum sjúklingum. Enn er ov tíðliga at siga, um hetta í framtíðini verður ein standard tænasta til diabetikarar, men eg vóni, at samfelagið kann bjóða hesa tænastu til teir sjúklingar, sum taka sjúkuna í álvara, endar Jens Andreasen.

### FAKTA

250 føroyingar hava sukursjúku í bólkinum typa 1. Tað vil siga, at hesi skulu hava sproytu fleiri ferðir um dagin og eru undir eftirliti

2500 føroyingar hava sukursjúku í bólkinum typa 2. Tað vil siga, at hesi ikki hava sproytu fyri neyðini hvønn dag. Bert helvtin av typu 2´arum hava diagnosu og fáa viðgerð, meðan hin helvtin gongur óvitandi um teirra heilsutrupulleika.

Lívið kann økjast við 20 árum, um tú ert sukursjúklingur og fær røttu viðgerðina



*Nýggja insulinpumpan er á stødd við hálvaaðru svávuldós, og hevur hon bæði fysiologiskar og praktiskar fyrimunir. Her roynir sjúklingur pumpuna á fyrsta sinni*

Mynd: Jens Kristian Vang